samstundis undirstrikar hann, at hvørki sambandsflokkurin ella sjálvstýrisflokkurin kunnu hjálpa fjøldini "út undan tí trælaoki, hon nú livir undir". Tað, sum umræður, er at gerast búskaparliga frælsur. Tann tunga byrðan, vit kenna, er at vera bundin til kapitalvaldið. Um hetta er danskt ella føroyskt er honum eitt feitt, og tí mælir hann fiskimonnum til at fylgja javnaðarflokkinum. So er eingin "vandi" við fullfíggjaðum sjálvstýri, tí endamál javnaðarfloksins er "ein samfelagsskipan, har øll útbýting av arbeiðaranum er burturtikin, við at fiskimenn sjálvir taka alla framleiðslu og alla sølu í egnar hendur".

Havstreym hevði gott skil á búskapi. Hann er helst ein tann fyrsti her heima, sum roynir at greiða føroyingum frá teim djúpari liggjandi orsøkunum til ta heimsumfatandi búskaparkreppuna, sum eisini rakti Føroyar.

Hann útgreinar eisini kreppuna her heima og vísir á, at orsøkirnar lutvíst koma uttaneftir og lutvíst stava frá innlendis viðurskiftum – fyrst og fremst teimum illa skipaðu føroysku fiskasøluviðurskiftunum. Føroyskir útflytarar selja til fiskakeyparar, sum teir eru heftir at, og sum bert ynskja at halda lágar prísir fyri at økja um vinningin.

Tað, sum kundi bøtt um hetta óskil, var ein betur skipað fiskasøla, sum var skipað á kooperativum grundarlagi, ið kundi geva fólkinum ágóðan av teirra arbeiði.

Millum tær mongu gávur, hann hevði, vóru eisini skaldagávur. Hann nýtti stuttsøgur sum politiskt vápn. Men hann yrkti eisini sangir, ið spjaddust millum manna í avritum. Hesir sangir vóru nógv sungnir um borð á sluppum í tríatiárunum. Teir vóru eisini prentaðir í Sosalinum.



*Mia, mamma Havstreym, gjørdist nærum 100 ára gomul. Hon kom úr Havn og sjokeraðu Gøtufólk, tí hon var í hatti. Ikki minni skakað vóru tey, tá hon bæði fekk sær gardinur og urtapottar í vindeyguni*



*Her sæst Hans Jacob Havstreym saman við vinmanninum Sámal Petur í Køkinum*

## Fakligi stríðsmaðurin

Havstreym legði stóran dent á, at fakligt og politiskt stríð vóru tvær síður av somu søk. Hann førdi nýggj sjónarmið inn í tað fakpolitiska stríðið hjá fiskimonnum soleiðis, at hann vildi seta onnur krøv enn bert tey peningaligu.

Hann kravdi eisini almenna viðurkenning av fiskimanninum. Vildi hava hesa stætt viðurkenda sum ein av samfelagsins grundstuðlum, og vísti á, at ein kundi ikki tala um forsturlandskærleika og samstundis undirmeta ta stætt, sum helt samfelagnum uppi.

Havstreym royndi eisini upp undir sáttmálasamráðingar at nýta tey mest nútímans argument, sum tá vóru uppi í tíðini hjá framtakssinnaðum búskaparfrøðingum: Tað ráddi um at økja um keypiorkuna til tess at fáa gongd á samfelagsbúskapin og stuðlaði út frá hesum kravið um at parturin hjá fiskimonnum varð 36% av fonginum í staðin tey galdandi fyri 33½%.

## Maðurin Havstreym

Tey sum kendu Havstreym greiddu so livandi frá honum, at tú gerast vísur í, at hann hevur skarað framúr á mangan hátt. Men hann hevur samstundis verið bygdarmaðurin, sum tók lut í øllum vanligum bygdalívi. Hann var burtur um summarið, velti og var í bønum vetrardagar – og um kvøldarnar gekk hann saman við øðrum ungdómi inn í tey føstu húsini, har ung og gomul samlaðust til gamans og álvara.

Hesar løtur nýtti hann til at tala sína søk, og kundi tað ganga nokk so heitt til viðhvørt. Illstøða var tó ongantíð, tí hann var stak viðeiriligur maður, sum dugdi væl at fara við fólki. Tað hendi ikki so sjáldan, at hann fekk teir gomlu í sín part, hóast politisku sjónarmið hansara mett við teirra eygum mugu hava verið rættiliga víðgongd. Hetta stóðst helst av, at hann var tað vit vanliga kalla "eitt gott fólk", ein maður, sum hugtók øll tey, sum komu í samband við hann. Harafturat var hann lættur og kátur av lyndi og hevði tí lætt við at koma í samband við onnur.

Illveðursdagar sat hann uppi á loftinum og las og skrivaði. Greinir hansara prógva, at hann hevur havt góðan kunnleika til heimsins mætastu rithøvundar.

Samanumtikið var Havstreym ein maður, sum á so mangan hátt skaraði framúr. Hann dugdi avbera væl at skriva og visti altíð, hvat hann skrivaði um. Stílur hansara var flótandi, greiður og eggjandi, antin hann skrivar á donskum ella føroyskum. Hann var við til at lyfta Sosialin upp á hædd við tey bestu javnaðarbløðini í Norðurlondum árini 1928-32.

Hann skilti eisini, at ein fortreytin fyri framburði var, at fakligu leiðarar vórðu skúlaðir fakliga og teoretiskt, og royndi hann tí at eggja ungum føroyingum at fara á arbeiðaraháskúlar. Hesum vildu danskir javnaðarmenn eisini stuðla.

Á øðrum økjum skilti hann seg eisini burturúr fjøldini. Hann var nevniliga eisini adventistur. Í hvussu er var hann hugtikin av teirra læru. Her kann hann hava verið ávirkaður av danskari gentu, hann hevði samband við, Frida Kock. Tað var ógreitt, hvussu nógv var millum teirra, men hon skrivaði so til Miu, eftir at hann var deyður.



*Hans Jacob hevði avbera vakra hondskrift*

## Sigur og ósigur

Til formansvalið í Føroya Fiskimannafelag á heysti 1931 stillaði Havstreym upp móti sitandi formanninum Gunnar Winther. Havstreyn fekk 715 atkvøður og var hetta meira 2/3 av greiddum atkvøðum. Hetta var ein stórur sigur.

Men til løgtingsvalið í januar 1932 gekk ikki so væl. Javnaðarflokkurin roknaði við 4-5 monnum, men teir fingu bert teir somu tveir, sum vóru valdur í 1928. Í seinasta brævinum Havstreym skrivar til danskar floksfelagar dylir hann ikki fyri vónbrotinum. Men parturin hjá Havstreym í Gøtu lá ikki eftir. Har fór atkvøðutalið úr 6 uppí 38.

Betri gekk í 1936. Tá fekk javnaðarflokkurin seks umboð á ting. Eitt teirra var úr Eysturoynni.

Hetta hevði uttan iva blivið Havstreym.

Tað vóru stórar vónir settar til Hans Jacob Havstreym. Men hetta glasiliga útlitið brast, tá ið Immanuel ikki kom heim aftur í 1932, og 19 mans fingu eina váta grøv. Millum hesar var Hans Jacob Havstreym, sum bert gjørdist 28 ára gamal.

Sjálvur kendi eg væl Miu, mammuna. Vit búðu í sama grannalagi. Hon greiddi eina ferð frá, at hon bønaði Hans Jacob um ikki at fara til skips, nú hann hevði fingið hendan álitissessin. Men hann mátti fara. Formansstarvið var tá heldur ikki fulltíðarstarv.

Í dag eru tey sera fá, sum minnast Havstreym. Í gomlum døgum hekk mynd av honum í Gøtu Skúla. Hetta gjørdi so tað, at næmingarnir eisini fingu kunnleika um mannin.

Tað finst rættuliga fitt av tilfari um Havstreym. Millum annað brævaskifti hann hevði við oddamenn í danska javnaðarflokkin. Kanska kundi Gøtu Forminnisfelag savna hetta tilfar í hansara barnaheimi. Hetta kundi givið uppvaksandi ættaliðinum møguleika at kunna seg um henda megnarmann úr túninum í Norðragøtu, sum hevði kunnað ment okkara samfelag, um ikki tað gekk sum tað gekk.

**Komandi partur**
Í komandi parti verður framhaldandi greitt frá grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu saman við søgubrotum úr Gøtu

Sosialurin